## Nýggir filmar hesa vikuna

**Støð**
Filmsheiti, **Dagur/ar** ***(klokkutíð)***

**Svf**
- Uppreistur (Mutiny) – am. aut. filmur, **23. *(21.45)***
- Born Romantic – bretskur filmur -Óhóskandi fyri smábørn, **23. *(23.10)***
- The Nutty Professor – am. skemtifilmur, **24. *(21.05)***
- Meet Joe Black – am. filmur, **25. *(21.35)***
- Felicia's Journey – bretskur/kanadiskur filmur, **27. *(21.15)***

**3+**
- Hvítar nætur, **26. *(21:00)***
- Loyndarfylla oyggin, **24. *(19:00)***
- Søgnin um Sleepy Hollow, **25. *(12:25)***

**Canal+**
- Charlotte Gray, **23. *(19:00)***
- Delta-liðið, **26. *(20:00)* 27. *(8:50)* 29. *(3:55)***
- Demonurnar hjá Louba, **28. *(19:00)* 29. *(8:45)***
- Deyðans sjúkrahús, **29. *(19:00)***
- Door to Door, **27. *(19:00)* 29. *(13:40)***
- John Q, **24. *(19:00)* 25. *(9:05)***
- Out Cold, **23. *(4:30)***

**Canal+Gul**
- 61th Golden Globe Awards, **25. *(1:00)* 26. *(18:00)***
- John Q, **26. *(9:40)* 28. *(20:00)***
- Love the Hard Way, **23. *(22:10)***
- The Navigators, **23. *(6:00)***
- The Scorpion King, **23. *(23:55)***

**DR 1**
- Fucking Åmål, **29. *(21:30)***
- Gyltar leinkjur, **23. *(22:20)***
- Harlequin: At elska Evangeline, **26. *(21:00)***

**DR 2**
- My Fair Lady, **25. *(15:50)***

**Hallmark**
- Drápsligir dreymir, **25. *(20:15)***

**TV 2 zulu**
- Cheech og Chong á pottinum, **26. *(19:00)***
- Farvæl, mín elskaða, **24. *(0:25)***
- Never been kissed, **29. *(19:35)***
- The Brood, **23. *(22:30)***

**TV 3**
- Rok á kleystrinum 2 - nonnu húsið, **23. *(19:00)***
- Tango & Cash, **26. *(21:00)***

**TV-1000**
- Bad Company, **24. *(19:00)* 28. *(20:10)***
- Battle Royale, **29. *(3:50)***
- Double Teamed, **24. *(15:00)***
- Emmett's Mark, **29. *(19:00)***
- Hope and Glory, **26. *(19:00)***
- Hundatrikkið, **27. *(19:00)***
- The Accidental Spy, **25. *(19:00)***

**TVDanmark1**
- Almost Heroes, **24. *(14:55)***
- Cypress Edge, **24. *(0:35)***
- Mumian, **26. *(20:00)***
- Svigersonur uttan líkar, **27. *(20:00)***
- True Friends, **25. *(23:55)***

**Fríggjadag 23. kl. 18.00**



### Fres 4
Man nøkur sending fara at koma í dag? Tað er tað, at Angela og Olgar eru sjúk, men so er tað at Hannibal kemur at hjálpa, so sendingin kemur kortini. Angela og Hannibal hava ongan skatt funnið enn, hvussu man fara at gangast í dag?

**Fríggjadag 23. kl. 18.00**



### The Simpsons
Bart er og vitjar á einum indianarakasino. Her møtir Bart einum indianskum spámanni, ið sigur Bart, hvussu framtíð hansara fer at hilnast. Bart fær at vita at hann verður ein arbeiðsleysur, nassandi tónleikari og bróður til forsetan av USA, Lisa Simpson.

**Fríggjadag 23. kl. 19.00**



### Charlotte Gray
Í 2. Veraldarbardaga er Charlotte Gray handan fígginda markið í sunnaru helvt av Fraklandi. Her roynir hon at fáa samband við mótstøðurørsluna. Hon roynir at finna unnusta hennara - piloturin Peter, ið hvarv, tá flogfar hansara bleiv skotið niður.

**Fríggjadag 23. kl. 21.05**



### Street Fighter
Óndi harðræðisharrin Bison heldur vísindamannin Dr. Dahlsim og hjálparmenn frá Allied Nation sum gíðslar. Dr. Dahlsim verður noyddur framleiða ein stríðsmannin: Blanka. Obersturin Guile (Jean-Claude van Damme) er einasta vónin hjá tí frælsa heiminum.

**Leygardag 24. kl. 18.30**



### Boðberar Buddha
Sendingin er partur av tí regluliga Temaleygardegnum hjá Dr2 og snýr seg um útbreiðsluna av Buddhismuni frá eystri til vest og um danskarar, ið hava verið virknir sum boðberar Buddha.

**Leygardag 24. kl. 19.00**



### John Q
Sonur John, Michael hevur alvarsligar trupulleikar við hjartanum. Hann hevur brúk fyri eini hjarta-transplantatión skjótast gjørligt. Men sjúkratryggingin betalir ikki fyri skurðviðgerðina. Í vónloysi tekur John starvsfólkið á sjúkrahúsinum til fanga. Við í leiklutunum eru m.a. Denzel Washington og Robert Duvall.

**Leygardag 24. kl. 19.00**



### Spy Hard
Generalurin Rancor hóttir við at spreingja heimin í stykkir. Men hann hevur brúk fyri tí eina mikrobitanum, ið professarin Ukinsky hevur framleitt. Dick Steele (Leslie Nielsen) verður settur á málið.

**Leygardag 24. kl. 20.30**



### Sonur okkara Michael Jackson
Í hesari spildurnýggju sendingini fortelja foreldrini hjá Michael Jackson, Joe og Katherine, um teirra víðakenda son, um ákæruna fyri pedofili og tað trýst, henda grundleysa ákæra hevur lagt á familjuna. Tey fortelja eisini um barnaárini hjá soninum og um ommu- og abbabørnini og vísa heimið hjá Michael Jackson. Tað eitur "Neverland".

**Sunnudag 25. kl. 17.50**



### Oliver´s Twist
Í sendingini Oliver´s Twist ger Jamie Oliver tað, sum hann elsker mest: Mat til sínar vinir. Gjøgnum hesa røðina av matsendingum møtir hann fólki úr allari verðini, sum hann bjóðar inn til at royna sín mat, sum tey ongantíð fara at gloyma.

**Sunnudag 25. kl. 19.10**



### In the Actors Studio: Bruce Willis
Í The Actors Studio hevur James Lipton fingið vitjan av Bruce Willis, ein av teimum heilt stóru aktion hetjunum. Hann sigur frá um filmar sínar, m.a. "Die Hard"-filmarnar, "Pulp Fiction" og "Sætti sansurin"

**Sunnudag 25. kl. 20.00**



### Ein gerandisdagur við Jóannes Jakobsen
Jóannes Jakobsen hevur ein óvanliga langan arbeiðsdag, men tað hóvar honum væl. Eg má vera superpedagog, sigur hann við einum stórum smíli. Umframt at vera pedagogur er hann maðurin aftanfyri M´as Blues Band. Hann er sangskrivari, fótbóltsvenjari, málari og familjumaður við stóra F.

**Sunnudag 25. kl. 20.00**



### Sjakalurin
Bruce Willis er í høvuðsleiklutinum, sum tann kendi og illa umtalaði yvirgangsmaðurin, Sjakalurin. Hann fær til uppgávu at myrða ein persón, ið er ovast í amerikansku stjórnini. Hvør, ið komandi offurið verður, er loyniligt. Fyri útførdu missiónina fær Sjakalurin 70 milliónir dollarar.

**Mánadag 26. kl. 18.00**



### Frasier
Fyri at hátíðarhalda trý-ára dagin hjá útvarpsstøðini vísir Roz Frasier nøkur av teimum gomlu sendingunum. Hetta fær Frasier at hugsa um fyrstu tíðina í Seattle og ikki minst um, hvussu nógv betri forholdið við pápan er blivi. Heimkomin sannførir hann Daphne um, at hon skal fara heim til Ongland fyri at vera saman við familjuni.

**Mánadag 26. kl. 19.00**



### Teir síðstu dagarnir
Hetta er ein amerikanskur dokumentarfilmur um týningina av ungarsku jøtunum í teimum síðstu árunum av 2. Veraldarbardaga. Tað vóru tey fáa, ið ivaðust í hvussu kríggið fór at enda. Men hóast fleiri og stórar ósigrar helt Týska Ríkið á fram við at brúka nógva orku uppá burturbeiningina av evropeisku jøtunum. Og í 1944 vórðu flest jøtar dripnir.

**Mánadag 26. kl. 20.00**



### Mumian
Í 1920´unum, eftir eitt blóðugt stríð við beduinarar, finnir tann djarvi fremmanda-legionerurin Rick O´Connell tann forbodna býin Hamunaptra. Her skal ífylgi søgnini vera eitt gravkamar fylt við dýrgripum. Seinni leiðir hann tí klossutu og tó vøkru Evelyn, ið er egyptologur, og hennara óálítandi bróðir Jonathan. Men aðrar kreftir virkar ímóti teimum.

**Mánadag 26. kl. 21.00**



### Tango & Cash
Ray Tango og Gabriel Cash eru tveir suksessfullir løgreglumenn, ið stríðast móti rúsevnissølu. Teir kunnu ikki tola hvønn annan. Brotsmaðurin Yvies Perret er í øðini, tí hann hevur mist pengar og Tango og Cash eru orsøk til hetta. Hesin brotsmaðurin fær teir báðar handtiknar fyri morð.

**Týsdag 27. kl. 19.00**



### Door to Door
Tann heilaskaddi duraseljarin Bill Porter (William H. Macy) hevur ein truplaðan gerandisdag, men hann noktar at uppgeva at liva sum eitt vanligt lív. filmurin er grundaður á eina sanna søgu.

**Týsdag 27. kl. 19.25**



### Tourettes Syndrom
Øll halda Rob Evans vera svakan, fullan ella skeivan. Rob lýsir seg sjálvan sum "hernaðarliga Tourette". Hann rópar og bannar, meðan hann gongur í tí lokala matvøruhandlinum og eisini meðan hann er í almennu bussleiðini. Hann livir eitt heilt serligt lív og honum dámar tað.

**Týsdag 27. kl. 21.00**



### Teir fantastisku 5 - í tænastuni hjá tí góða smaginum
Hendan nýggja lívstílssendingin letur tann vanliga danska mannin í hendurnar á teimum fantastisku 5, ið vita. Endamálið er at umgera tann vanliga keðiliga danan um til ein stíltryggan ein. Í hvørjari sending verður ein maður gjørdur til reiðar til eina serliga hending.

**Týsdag 27. kl. 23.05**



### Nýggja Vietnam 2:4
Fjøllistamaðurin Khanh er fyrrverandi politistur í loyniløgregluni, sum ansar eftir øllum. Eftir 18 ár fór hann bæði úr flokkinum og úr starvinum og gjørdist avantgardu listafólk. Hansara umstríddu sjónarmið um listina, sum hann heldur umboðar seksualitetin og medvitið, og við tí eisini frælsið, eru ikki vældámd av myndugleikunum.

**Mikudag 28. kl. 19.30**



### Mermaids
Í 1960´unum í USA møta vit tí óvanligu, sveimandi og altíð flytandi ógiftu mammuni Mrs. Flax (Cher), ið ferðast frá staði til stað saman við tveimum døtrum. Mrs. Flax er bangin fyri álvarsomum kærleiksforholdum, so hon flytir, tá eitt tílíkt forhold tekur seg upp.

**Mikudag 28. kl. 20.00**




### Undan væðingini: Valkyrjur og eiturkoppadrotningar
Sendingin er ein lýsing av listamanninum Edward Fuglø, sum tá SvF gjørdi sendingina evnaði búnar til ein barnaleik. Í leikinum er ein eiturkoppadrotning og tað skal gott hugflog og handalag til at gera eina slíka. Hjá Edwardi bila hvørki.

**Mikudag 28. kl. 21.45**



### Pokerdreymurin - ein danskari í Las Vegas
Fleirmillióningur, pokerleikari, danskari. Gustav Hansen er 29 ár og livir lívið sum pokerleikari. Beint eftir student fór Gustav til Monacco fyri at luttaka í eini stórari backgammon-kapping. Hann vann einki, men fekk hug at spæla fyri pengar - hesum hevur líka síðan livað av.

**Mikudag 28. kl. 22.30**



### Jimi Hendrix: Greatest Hits
Johnny Allen Hendrix varð føddur 27. novembur 1942 í Seattle, Washington, USA. Óiva er hann ein tónleikari, ið hevur ávirkað nýmótans tónleika sera nógv og serliga mátan at spæla elektriskan gittar.

**Hósdag 29. kl. 18.00**



### Frasier
Sjálvt um Frasier er ímóti "blind-dates", gongur hann við til at fara út við vøkru vinkonuni hjá Roz Sharon. Frasier fellir fyri sjarmuni hjá Sharon, men tá Bulldog kemur framvið og byrjar at tosa um ítrótt við Sharon, ið er professionellur golfspælari, er Frasier púra uttanfyri.

**Hósdag 29. kl. 20.00**



### Nótin
Vakri telduserfrøðingurin Angela Bennett heldur seg innandura - tað mesta av hennara samskifti við umheimin er via alnótina. Men ein dagin tekur hon ímóti eini diskili frá einum av alnótarvinum sínum. Her eru topployniliga vitan á. Tilveran hjá Angelu broytist nú heilt. Hon er noydd at flýggja út í ein heim, har hon ongan hevur at líta á.

**Hósdag 29. kl. 22.00**



### Musiksendingin - sendingin um tónleik
Fyrsta útgávan av nýggju tónleikasendingini Musikprogrammet - ein seriøs tónleikasending fyri tey vaksnu. Innsløg, viðtalur og dokumentarar um m.a. Bob Marley, Tupaz Shakur, David Bowie, Mew, Swan Lee og hip-hop filmurin "Freestyle". Anja P. Overby er vertur.

**Hósdag 29. kl. 19.00**



### Tann stóri hvíti hávurin
Tá sungið verður um "flyvefisk i leg" í sanginum Mandalay, er tað ikki júst stórar, hvítar hávar, ið hugsað verður um. Men hávarnir kring oynna Seal Island uttan fyri Cape Town í Suðurafrika kasta seg veruliga upp í luftina eins og rakettir fyri at fanga veiðuna.

**Sunnudag 25. kl. 11.00**

### Úr gamla plátusavninum
Leitað hevur verið millum gomlu lakpláturnar - tær sonevndu 78-pláturnar. Tónleikurin, sum spældur verður, er norskur, danskur og týskur.

**Sunnudag 25. kl. 14.15**

### Framvið ánni
Sverri Patursson fer at greiða frá um gomlu rættina í Trøllarókini sunnanfyri Glyvursnes. Tað er onnur sending.

**Sunnudag 25. kl. 22.00**



### »Avdúking«
Ein evnissending um veking byrjar sunnukvøldið kl. 22.00.
Í sendingini verður týdningurin av andaliga vøkstri hins trúgvandi viðgjørdur.
Hetta er ein beinleiðis sending.

Vertur er Jógvan Skýlindal

**Hósdag 29. kl. 19.00**

### Tilvera: Fosturtøka
Ónevnd kvinna er gestur í útvarpsstovuni. Hon átti tvey heilt smá børn, tá hon varnaðist, at hon aftur var við barn. Hon helt seg als ikki verða føran fyri at eiga barn so skjótt aftur, so hon valdi fosturtøku.

## Ítróttur

**Leygardagin kl. 14.00**
Tipslørdag

CANAL+

**Sunnudagin kl. 20.00**
NHL: Carolina-Buffalo
**Mikudagin kl. 0.00**
NHL: Florida-Philadelphia

CANAL+

**Leygardagin kl. 19.25**
Seria A
**Sunnudagin kl. 19.25**
Seria A

**Sunnudagin kl. 15.20**
Hondbóltur: Slagelse-Viborg, kvinnur
**Mikudagin kl. 20.50**
Hondbóltur: Aalborg DH-Ikast/Bordgin, kvinnur

EUROSPORT

WC Bobsleðu úr Lillehammer, Noreg
WC Bobsleðu úr St. Moritz, Schweiz
WC Skíðlop úr Sapporo, Japan
WC Langrenn úr Moena-Cavalese, Italia
WC Skeleton úr Lillehammer, Noreg
WC Skíðskjóting úr Antholz, Italia
WC Stórsnirr úr Maribor, Slovenia
Tennis Australian Open
Snooker Welsh Open
Fótbóltur Franska steypakappingin
Fótbóltur African Nations Cup

TV2 ZULU

WC Super-G úr Kitzbühl, Eysturríki
EM-hondbóltur úr Slovenia
Fa Cup Fótbóltur
NFL

**Leygardagin kl. 18.25**
La Primera
**Leygardagin kl. 20.25**
La Primera
**Leygardagin kl. 2.10**
Nevaleikur úr Atlantic City, USA
**Sunnudagi kl. 19.55**
La Primera
**Sunnudagin kl. 21.55**
NBA: Dallas-Sacramento

TV1000

Golf Dunhill Championship
Fótbóltur Enska Liga-Cup
Euroleague Kurvabóltur


## VARPIÐ

Eykablað í Sosialinum
hvønn fríggjadag

Postsmoga 76
110 Tórshavn
Telefon: 341800
Fax: 341801
e-mail: varp@sosialurin.fo

Útgáva: Sosialurin
Umbróting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin